

# Føroyingar skulu sita við borðið har avgerðir verða tiknar

**Jan Müller**

02.11.2015 - 14:26

Oljan.fo

"Vit skulu hava fullan limaskap í Norðurlandaráðnum, og vit skulu sita við borðið í Norðurlondum og í Arktis, har avgerðir, ið viðvíkja Føroyum, verða tiknar," sigur Kári P. Højgaard, tingmaður og limur í Útnorðurráðnum, nú hann luttók á Arctic Circle ráðstevnuni í Íslandi.

Kári P. Højgaard, sum hevur verið partur av arbeiðinum í útnorðri hesi seinastu árini, heldur tað hevur stóran týdning fyri Føroyar, at vit eru partur av og eisini sita við borðið, har avgerðir verða tiknar, sum viðvíkja okkum. Hann heldur, at júst føroyska luttøkan á arktisku ráðstevnuni í íslendska høvuðsstaðnum herfyri var eitt gott dømi um, at Føroyar eru við saman við teimum stóru.

Hann vísir á, at síðani Útnorðurráðið varð sett á stovn fyri 30 árum síðani, er okkara leiklutur meira altjóðagjørdur. Vit eru við í fleiri millumlanda tingmannanevndum, og ikki minst í sambandi við Arktis eru vit vorðin nógv meira sjónlig. Broytingarnar í Arktis orsakað av veðurlagnum ávirka so eisini okkum, her t.d. sjóvarhita og fiskastovnar, so føroyingar eru farnir at brúka meira orku uppá tað arktiska arbeiðið í mun til samstarv við meginlandið.

Kári P. Højgaard var við til Arctic Circle, sum partur av Útnorðurráðnum saman við Jørgen Niclasen. Har vóru serstakir fundir, ið Útnorðurráðið skipaði fyri ella var partur av. Harumframt luttók hann eisini serstakliga til framløgur, sum føroyingar hildu eitt nú tað stóra tiltakið leygardagin í stórhøllini í Hørpuni, har m.a. løgmaður helt røðu og gjørdi vart við okkara støðu í Arktis umframt Sjúrða Skaale, fólkatingslim og Hákun Djurhuus, SEV-stjóra.

“Framløgurnar vóru framúr góðar og her ikki minst hon hjá Sjúrða Skaale, sum var serstakliga væl úr hondum greidd, nú hugsað verður um, at Føroyar kunnu gerast partur av framtíðar virkseminum í Arktis. Føroyar vóru umrøddar uppá ein sera positivan máta. Haldi eisini at okkara framløgur mintu nógv um tær, sum kinverjar høvdu á ráðstevnuni, har teir eisini umrøddu møguleikarnar, sum nýggju siglingarleiðirnar millum Evropa og Asia fara at geva. Eg haldi eisini tað var áhugavert at hoyra, hvussu nógvir møguleikar finnast í Føroyum, og hvussu týdningarmikið tað er, at Føroyar eru sjónligar og bjóða seg fram sum veitarar ol.

Og her ikki minst tann sannroynd og skilagóði boðskapur, at alt í Føroyum kann røkkast innan fyri ein tíma, meðan tað aðrastaðni kann taka fleiri dagar. Hetta haldi eg er ein sera týðandi boðskapur at melda út.

Eg má eisini siga, at vit í Føroyum kanska hava nøkur av teimum mest væl útbúnu fólkunum í heiminum, og hetta er nakað, sum vit eisini eiga at siga frá. Tað er ikki so langt síðani, at vit áttu 10% av øllum yvirmonnum í Maersk, og at ein stórur partur av okkara ungdómi leitar sær hægri útbúgving eiga vit heldur ikki at gloyma. Vit teljast millum tey fremstu at servicera, hvat tað skal vera."

Kári Højgaard heldur tað eisini vera ómetaliga gott, at tað kemur fram í slíkum forum sum Arctic Circle, at vit eiga havnir og fólk, sum veruliga kunnu taka ímóti flutninginum í Arktis. At vit so eisini í løtuni eru við at byggja út havnir. Vit hava væl útbygd havnaløg, sum kunnu taka ímóti stórt sæð øllum skipum, og útbyggingar fara fram av okkara størstu havnum í næstu framtíð, soleiðis at man verður uppaftur betur fyri at veita tænastur.

Kári Højgaard var rættiliga ovfarin av, at so mong fólk lýddu á føroysku framløgurnar í Hørpuni og heldur hann tað má vera tí, at tær vóru so áhugaverdar.

“Vit smæddust ikki aftur millum fleiri av heimsins størstu tjóðum. Og kunnu vit ásanna, at tað týdningarmesta í Útnorðri er, at vit sita sum fastur partur við borðið.

Vit mugu vera við í fremstu røð, og ikki bara verða umboðaðir av einum triðja parti. Har man ikki er sjálvur, har er man bara hálvur. Í Arctic Circle eru nógv av heimsins londum við og lond, sum liggja fjart frá Arktis men sum hava áhuga í Arktis. Tað er sera týdningarmikið, at vit eru við og sita við borðið.

Vit fara eftir at fáa sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum. Vit skulu sjálvandi verða umboðaðir sum ein integreraður partur alla staðni, har avgerðir verða tiknar, sum eisini viðvíkja okkum.

Í sær sjálvum hevur Danmark einki við Arktis at gera. Tað eru Grønland og Føroyar, sum gera, at Danmark er partur av Arktis.

Vit eiga at sita við borðið í Arktiska ráðnum. Føroya løting eigur at hava ein lim í parlamentarisku nevndini fyri Arktis. Í dag luttaka vit sum partur av Útnorðri. Okkara rødd skal vera til steðar alla staðni, har avgerðirnar verða tiknar."

Kári Højgaard varð valdur í Útnorðurráðið í 2001 og hevur sitið har við undantaki av 2011 til 2013, tá hann var landsstýrismaður.

Føroyingarnir, sum høvdu framløgur á Arctic Circle vóru: Aksel Johannesen, løgmaður, Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður, Hákun Djurhuus, SEV-stjóri, Jørgen Niclasen, tingmaður og limur í Útnorðurráðnum, Christian Nagata, stjóri í Guðrun Guðrun, Bárður Larsen, lærari á Fróðskaparsetrinum, Ásmund Guðjonsson, stjóri í Nora og Birita í Dali, stjórnmálafrøðingur. Sí eisini myndirnar.








ARCTIC CIRCLE
ArcticCircle.org
ARCTIC CIRCLE
ArcticCircle.org


ARCTIC CIRCLE


ARCTIC CIRCLE
2015
OCTOBER 16 - 18
PARIS2015
COP21-CMP11


REYKJAVIK, ICELAND
FRIDAY, OCTOBER 16, 2015
ARCTIC CIRCLE
PARIS2015
COP21·CMP11


ArcticCircle.org
ARCTIC CIRCLE
ArcticCircle.org


ARCTIC CIRCLE
ArcticCircle.org










Blue Bio-economy in the
Arctic and North Atlantic
Ásmundur Guðjónsson, director
NORA


International Conference
Growth in Blue
Bio-economy
NORDIC HOUSE · TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS · 2-3 JUNE 2015






NORA as an
ARCTIC arena
"The NORA Region occupies a strategic position
between Europe and North America, as an
entryway to the Arctic." – OECD
7










ARCTIC CIRCLE
REDRAWING THE ENERGY AND ECONOMIC MAP:
THE FAROE ISLANDS' MOVE FROM PERIPHERY TO
CENTRAL HUB IN THE ARCTIC
SPEAKERS:
ArcticCircle.org




REYKJAVÍK
ARCTIC CIRCLE
















Guðrun & Guðrun
Faroe Islands




The 4th Exploration Licensing Round
Faroe Islands 2017
FOIB


ARCTIC CIR


2017
FAROE ISLANDS


INTO THE ICE
– The quest for knowledge at the North Pole
Dr. Jan-Gunnar Winther, director Norwegian Polar Institute
N-ICE2015
NORWEGIAN YOUNG SEA ICE CRUISE
CIRCLE


The act on international legal agreements from 2005
With the act no. 579, 2005, on the right of the Government of the Faroe Islands to conclude international legal agreements, the Faroes got the right to
Independently and without authorization (but with a duty to fully inform Danish authorities) to negotiate and conclude treaties on behalf of and in the name of the Kingdom of Denmark within matters solely transferred to the Faroe Islands.
Exceptions were especially that the act did not apply to
Defence and security matters
Agreements which shall also apply to Denmark or Greenland.
Agreements to be negotiated within an international organisation of which the Kingdom of Denmark is member.


A high level of de facto freedom
Therefore the Faroe Islands have a lot of de facto autonomy in foreign affairs.
Examples:
The Faroe Islands has been allowed to stay outside the EU.
The Faroe Islands has a free trade agreement with Iceland.
The Faroe Islands was allowed to in the mackerel conflict in the name of Denmark in respect of the Faroe Islands to suit the EU in an arbitration court under UNCLOS, even if Denmark is a member of the EU (the other side of the conflict).
The Faroe Islands are not part of the EU-US embargo against Russia, even if it would be easy for Denmark to envoke inconsistency with the common interests of the Kingdom (fx art. 2, stk. 2 in the 2005 act))


REYKJAVIK
ARCTIC CIRCLE


The three popular sovereigns
• Implicitly the most foundational principle governing the Danish Kingdom is the principle of the three popular sovereigns.
• The authorities in Copenhagen have very seldomly employed active state powers towards Greenland or the Faroe Islands. Last time they were pretty active in the Faroes was during the economic crisis in the early 1990's and this nearly ended with a Faroese secession.




Elements of Greenlands political history and status
1721-1953 Greenland is a formal colony of Denmark
1953 Greenland becomes a region and part of Denmark through the enactment of the Danish Constitution
1953 Greenland obtains two seats in the Danish Parliament – Folketinge
1954 Greenland is taken off the United Nations Non-Self-Governing territories list in 1954
1967 First Greenlander allowed to become Chairman of the
(Country Council)